

## Ruskskip sent til hús

Brasilsku myndugleikarnir hava gjørt av at senda eitt bretskt farmaskip aftur til Bretlands við farminum, sum er 89 bingjur av alskyns burturkasti. Í bingjunum eru næstan 1.600 tons av brúktum hítum, fullum blæðum, heilivágsproytum, matleivdum, battaríum og øðrum. Teir brasilsku myndugleikarnir siga, at sambært pappírunum hjá skipinum vóru bingjurnar fullar av plastikki, sum skuldi endurnýtast, og eftir brasilskari lóg er tað ikki loyvt at innflyta plastikk til endurnýtslu. Bretski uttanríkisráðharrin, David Miliband, er í Brasil í hesum døgum, og málið við burturkastinum stendur á dagsskrá hansara har.

## Tosar við kurdarnar

Fyri fyrstu ferð hevur turkiski forsætisráðharrin, Tayyip Erdogan, hitt formannin í tí størsta kurdiska flokkinum í landinum, Ahmed Türk. Eygleiðarar meta fundin sum eitt týðandi skifti í turkiskum politikki, tí fyri bara nøkrum fáum mánaðum síðani ætlaði stjórnin at banna flokkinum at virka, tí hann varð hildin at samstarva við tann vápnaða kurdiska felagsskapin PKK. Aftan á fundin segði Erdogan, at fundurin hevði víst, at turkar og kurdar vilja liva saman í friði, og at tað gav vónir um eina betri framtíð fyri samfelagið. Umleið 12 milliónir kurdar búgva í Turkalandi.

# Næstan øll fingið Rogerspengar

**Eftir at tað gjørdist greitt, at Kenny Rogers ikki kom til Føroya kortini, hava fólk havt møguleika at biðja um at fáa peningin aftur. Nú hava tey flestu fingið sín pening**

ROGERSMÁLIÐ

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fyri næstan einum mánaði síðan gjørdist greitt, at Kenny Rogers ikki kom til Føroya kortini. Alt var annars klárt. Atgongumerki vóru seld og høllin bíløgd. Men brádliga gjørdist greitt, at fyriskipararnir saman við sínum umboðið ikki høvdu rindað fitt av peningi, og tí varð greitt, at ongin konsert bleiv við Kenny Rogers í høllini á Hálsi 17. og 18. septembur.

Eftir tað, tók mikið stríð seg upp millum fyriskipararnar og umboðið, og fyriskipararnir vilja draga umboðið fyri rættin.

Mitt í øllum málinum vóru fólkini, sum longu høvdu keypt atgongumerki. Fóru tey at fáa peningin aftur?

Boðini vóru 14. juli, at fólk skuldu senda atgongumerkini til eina postboks, áðrenn 1. august, og so skuldu pengarnir koma.

- Tað sær gott út nú. Næstan øll hava fingið pengarnar aftur, sigur Hans Jørgen Djurhuus, sum var ein av fyriskiparunum.

### Burturblivnir pengar

Tað var eitt sindur av rumbli, um ikki fyriskiparar og umboðsmaður høvdu nýtt peningin fyri atgongumerkini til lívsins uppihald. Men hesum vísir Hans Jørgen Djurhuus partvíst aftur.

- Umboðsmaðurin fór við onkrum pengum, men upphæddirnar eru ikki so stórar. So við at spýta eitt sindur í sjálvir, so er trupulleikin loystur, og øll fáa sínar pengar aftur, staðfestir Hans Jørgen Djurhuus.

Nær ella um rættarmál verður millum Sp/f Holmen og umboðsmannin, er ikki enn endaliga greitt, men málið koyrir sína gongd.

### Norðurlond avlýst

Upprunaliga var ætlanin, at Kenny Rogers skuldi hava fleiri konsertir í Norðurlondum í septembur. Upprunaliga var tað Sp/f Holmen, ið skuldi skipa fyri øllum hesum, men eftir eitt sindur av tíð, seldi Sp/f Holmen allar konsertirnar, uttan tær í Føroyum.

Fyri næstan einum mánaði síðan, vórðu Kenny Rogers konsertirnar í Føroyum tiknar av skránni, og tá Sosialurin hyggur í dag, kann staðfestast, at øll Norðurlond eru avlýst.



*Fyri næstan einum mánaði síðan, gjørdist endaliga greitt, at Kenny Rogers ikki kom til Føroya kortini. Nú hava tey flestu fingið peningin fyri atgongumerkini aftur*

# Ferðsluóhapp undir Gøtueiði

**Umleið klokkan 23 í gjár fór ein bilur útav vegnum millum Skipanes og Skálabotn. Ongin veruligur mannskaði var, men bilførarin hevði eitt vet av pínu í rygginum, og varð tí fluttur á Landssjúkrahúsið**

ÓHAPP

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað sá rættiliga ógvusligt út á vegnum millum Skipanes og Skálabotnum ellivutíðina í gjárkvøldi. Blá blink vóru at síggja í fleiri støðum. Løgregla og sjúkrabilar vóru at síggja, og tað sá rættiliga álvarsamt út.

Tíbetur var tað ikki so álvarsamt, sum tað sá út at vera.

- Tað var ein bilur, sum fór útav vegnum. Bilførarin var einsamallur í bilinum og hevur mist tamarhaldið á bilinum, so hann fór niður í veitina omanfyri vegin. Ongin skaði hendi, men bilførarin gramdi seg um pínu í rygginum, og tí varð hann fluttur á landssjúkrahúsið, sigur løgreglan.

Harumframt vita teir at siga, at bilurin varð tikin upp í nátt, og at nakað av skaða hendi á bilin.

Um orsøkina til óhappið vil løgreglan onki siga, men staðfestir, at førarin ikki hevði drukkið.

*Bilførarin, sum fór útav vegnum undir Gøtueiði sein í gjárkvøldið, varð fluttur á sjúkrahúsið, tí hann gramdi seg um pínu í rygginum*

